# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

KAPPING 2020/2021

## HVØNN TÝDNING HEVUR MOSI?



Næmingar: 7.A í Skúlanum á Argjahamri

# INNGANGUR

Vit í 7.a í skúlanum á Argjahamri valdu at arbeiða við mosa, tí vit vildu vita hvønn týdning mosi hevur fyri náttúruna og okkum, og um hann hevur nakran týdning.

Lærarar: Mariann Poulsen og Eyðbjartur Skaalum

mp1411i8@skulin.fo og es1909j9@skulin.fo

Luttakarar:

Maria Ivalu Sunadóttir, Gilli Arnoldson Poulsen, Mattias Kerá, Sjúrður Henriksen, Mattias Búgvason, Andrea Hallsdóttir Drangastein, Ukraine Athea Carreon Jajalla Danielsen

Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring

# INNIHALD

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Vit undrast á hvønn týdning mosi hevur?



# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Okkara hypotesa til týdning av mosi er:

- at lítil djór kunnu eta og liva í mosanum.



# 3. LEGG EINA ÆTLAN

**Fyri at vita svara av okkara hypotesu ætla vit at:**

- Fara runt og spyrja lærarar,og fólk, hvønn týdning mosi hevur.

- Hava samrøður við serfrøðingar

- Savna upplýsingar á netinum

- Fara runt um skúlan at kanna mosa

- Talgilda spurnarkanning

- Taka myndir av mosa



# 4. SAVNA UPPLÝSINGAR

## Hvat  er mosi?

Mosi er ein partur av náttúrini og sæst hann nógvastaðni. Hann er partur av fotosyntesuni (phtosenthesis). Mosin hevur sum oftast grønan lit og hann minnir um gras. Men mosin er øðrvísi enn gras og aðrar plantur, sum hava røtur at taka vatn til sín. Mosin hevur ongar røtur, ístaðin hevur mosin smáar røtur(rhizoids), men eru hesar partur av mosanum. Smáu røturnar brúkar mosin at súgva vatn við.





Mosin er harðførari enn vanligar plantur. Tí mosin kann gott liva í støðum uttan mold og vætu t.d. á steinum, trøum sum eru skorin niður og eisini mursteinar. Mosi kann veksa allaðstaðni, har líkindi eru til tess.

Tað eru umleið 12.000 sløg av mosa á jørðini, av teimum eru umleið 129 ymisk sløg her í Føroyum. Her eru tvey sløg av teimum vanliga sløgunum av mosa sum tú kann síggja úti í nattúrina:



Mynd: https://www.naturespot.org.uk/species/common-haircap-moss

Common Haircap
Hetta er eitt mosaslag, ið kann kann vaksa upp til 40 centimetrar. Eitt tað størsta, sum er til í Føroyum.



Mynd: http://macabredarling.deviantart.com/gallery/?offset=24

-Silky forklet moss
Tað er ein gulligur mosi, sum sær út sum gras.

## Fakta um mosa:

-Eitt slag av mosa kann gera eitt teppi av mosa eftir 2 ár

- Mosi hevur tvey kyn. Tað er kvennkyn og kallkyn.

- Til ber at eta nøkur sløg av mosa, men nøkur sløg eru eitrandi

# Roynd við mosa

Vit hava gjørt eina lítla kanning við mosa í skúlanum. Vit tóku mosan og hugdi eftir honum ígjøgnum eitt mikroskop. Tá ið vit høvdu mosan í hondini, kitlaði tað. Síðani funnu vit útav at tað eru lítil djór og egg í mosanum. Sí mynd.





Vit koyrdu okkara kamera á mikroskopið fyri at taka myndina, har sóu vit eggini.

Vit spurdu okkara lívfrøði lærara um hann kendi eggini. Saman komu vit komu fram til at tað møguliga eru sniglaegg, men vit eru ikki heilt sikkur.



# Roynd nr. 2

Vit hava gjørt eina aðra roynd.
Vit settu eina lampu upp, sum lýsti niður á mosan. Mosin lá eini trakt, sum stóð niður í eitt glas. Vit tendraðu lampuna og lótu hana lýsa í eitt døgn.
Hetta fyri at kanna um nakað livandi var í mosanum. Ífall onkur livandi vera var í mosanum skreið hon niður gjøgnum traktina niður í glasið.
Hetta hendir tí mosin verður ov heitur til smákyktini.
Har funnu vit lítil djór og ormar.
Myndirnar vísa, hvussu vit hava gjørt.









Vit funnið ikki nøkur egg í seinnu royndini. Tað kundi verið áhugavert at kanna, hvat slag av smákykt vit funnu.

Samrøða við Andreu Jacobsen:

Andrea Jacobsen arbeiðir við plantum her í Føroyum. Hon starvast hjá Hjálpirót.




Her eru spurningarnir vit spurdi hana og svarini, vit fingu:

Hevur mosi týdning fyri umhvørvi?

*"Alt grønt hevur týdning, tí at tað er partur av fotosyntesuni. Og tað ger mosi eisini og mosi ger ilt og insektur búgva í mosa"*

Hvussu er mosi komin til, og hvussu gamal er hann?

*"Tað er ringt at meta um, hvussu hvussu gamal mosi er"*

So lósu vit í okkara lívfrøði bók, Lívfrøði 1, at mosi er komin, tá ið ístíðin var.

Hvussu leingi livir mosi vanliga?

*“ Mosi doyr ikki nattúrliga”*

# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

Vit eru komin fram til at smákykt liva í mosanum. Vit funnu eisini útav, at smákykt leggja egg í mosanum, og vit gita, at tey eru sniglaegg, og okkara lívsfrøðilærari er samdur við okkum. Mosin er ikki týdningarmikil fyri okkum, men hann er týdningarmikil fyri nátturina. Hann er partur av fotosyntesuni.

Vit funnu eisini útav ,at mosin ongar røtur hevur, sum vanligar plantur hava, men hann sýgur vatn í seg úr jørðini, gjøgnum smáu røturnar. Mosin hevur eisini tvey kyn, og hann doyr ikki náttúrliga, men man kan saktans drepa hann, við t.d  eituri og um slítir hann frá har, sum hann grør.

Keldur sum vit hava brúkt:

Vit hava leitað eftir upplýsingum á netinum um mosa

https://study.com/academy/lesson/what-is-moss-definition-types-characteristics.html

https://www.woodlandtrust.org.uk/blog/2018/07/types-of-moss-in-the-uk/#:~:text=Swan%E2%80%99s-neck%20thyme%20moss%20(Mnium%20hornum)%20This%20is%20one,moss%20is%20one%20of%20our%20most%20common%20mosses.

https://directcompostsolutions.com/good-and-bad-moss/#:~:text=The%20bad%20moss%20is%20one%20that%20is%20dense,time%20you%20look%20at,%20or%20water%20your%20plants.

Vit hava gjørt eina spurnakanning á netinum. (Sí fylgiskjøl)

Vit hava gjørt eina roynd við mosa (sí savna upplýsingar)

Vit hava havt eina samtalu um mosa við Andreu Jacobsen, sum arbeiðir hjá Hjálpirót.

# 6. SIG ØÐRUM FRÁ

- Framløgu á hádeild og í flokkinum

# FYLGISKJØL

1. Hava tit mosa rundan um har sum tit búgva?



43 %   svaraðu "ja"

25 % svaraðu "nei"

20 % svaraðu "veit ikki"

2. Halda tit at mosi er týdningarmikil fyri jørðina?



51% svaraðu "ja"

17% svaraðu "nei"

20%  svaraðu "veit ikki"

3. Visti tú at mosin hevur tvey ymisk kyn?



24%  svaraðu "ja"

64%   svaraðu nei

4. Hvussu nógv ymisk sløg av mosi er til?



29%  svaraðu uml.  10.000

40%  svaraðu uml. 5.000

19% svaraðu uml. 12.000

5. Ger mosi nakað?



52% svaraðu "ja"

3%    svaraðu "nei"

33% svaraðu "veit ikki"